gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Trivnaðurin á barnagørðum í vanda

**Mannagongdin, tá ið børn verða tikin inn á dagstovn í Havn, er broytt. Fyrsta barnið á listanum hevur nú fyrsta rætt, og tað hevur longu ført við sær, at aldursspjaðingin á fleiri stovnum er farin út av lagi.**
**- Henda mannagongdin røkir fyrst og fremst áhugamálini hjá foreldrunum heldur enn børnunum, sigur Elsa Hansen, leiðari í Býlingshúsinum á Flat í Hoyvík**

DAGSTOVNAØKIÐ
*Turið Kjølbro*



*Stór ónøgd hevur verið millum foreldur um, hvussu mannagongdin hevur verið, tá ið børn verða tikin inn á stovn í Havn. Nú mannagongdin er broytt, vísa stovnsleiðarar á, at aldursbýtið á stovnunum er við at fara út av lagi.*

*Savnsmynd*

Seinastu nógvu árini hevur mikið rumbul staðist av listanum yvir børn, sum bíða eftir stovnsplássi í høvuðsstaðnum. Stór ónøgd hevur verið millum foreldur um, hvussu bíðilistin hevur verið umsitin og hvussu mannagongdin hevur verið, tá ið børn verða tikin inn á stovn. Fleiri ferðir hava foreldur fingið staðfest, at hóast barn teirra hevur staðið frammalaga á bíðilistanum, hevur eitt barn, sum hevur bíðað styttri, verðið tikið fram um. Hetta argar og tað skilja øll. Eisini politikararnir, sum hava ábyrgdina av økinum. Tískil er nýggj reglugerð til upptøku av børnum í umbúna og hon er í grundini longu tikin í nýtslu. Hon leggur upp til, at barnið, sum stendur ovast á listanum og tí hevur bíðað longst, sleppur fyrst framat. Hetta er eisini skilagott, hugsa tey flestu, men henda einfalda avgerðin hevur størri avleiðingar við sær enn so. Og tær vísa seg longu. Á fleiri dagstovnum, vit hava spurt okkum fyri hjá, síggjast ábendingar um, at aldursbýtið á stovnunum er við at fara út av lagi.

- Á eini stovu hava vit komandi ár bara eitt barn, sum skal í skúla árið eftir, ístaðin fyri 4-5 sum hevur verið tradisjónin. Okkum vantar elsta aldursbólkin. Forskjótingin í aldursbólkunum ger, at útskiftingin verður stór og royndir vísa, at tað hevur avleiðingar fyri trivnaðin á stovninum, sigur Óli Midjord, virkandi leiðari í Býlingshúsinum á Norðasta Horni.

- Í vøggustovuni hjá okkum eru tíggju av tólv børnum fødd í 1999. Hesi fara so øll úr vøggustovuni samstundis. Tað krevur sera nógv av starvsfólkunum at taka ímóti eini rúgvu av nýggjum børnum samstundis, tá alt er nýtt fyri øll. Av tí at børnini eru so stór, tá ið tey koma á stovnin, eru kanska bara eitt ár í vøggustovu, verður markið millum vøggustovu og barnagarð flótandi. Ein avleiðing kann verða, at ongar vøggustovur vera til endans, tey smæstu fara tá í dagrøkt og ikki fyri at siga nakað ringt um tað, men ein vandi er, at børn, sum onkursvegna hava ein serligan tørv, brek, eru seinment ella annað, ikki verða fangað nóg tíðliga tá, sigur Elsa Hansen, leiðari í Býlingshúsinum á Flat í Hoyvík.

## Óheppin gongd

Tað er ikki av ongum, at stovnsleiðarar tvíhalda um aldursbýtið og kynsbýtið fyri ein part. Hetta er eisini í samsvari við dagstovnalógina. Fyri trivnaðin á stovninum er umráðandi at javnvág er millum aldursbólkarnar. At børn hava javngomul børn at spæla við, at samljóð er millum aldursbólkarnar soleiðis at teir hava gleði av hvør øðrum, og at útskiftið av stovninum er natúrligt og ikki ov brátt. Eru øll børnini á eini stovu javngomul, fara tey úr stovninum í senn og sama tal av børnum byrjar í senn. Hetta er sera óheppið, siga stovnsleiðarar. Viðvíkjandi kyninum skilst, at stovnarnir ikki longur tvíhalda um eina neyva javnvág ímillum býtið av gentum og dreingjum.

Stovnsleiðarar skilja væl foreldur, sum illneitast og eru ørg um, at barn teirra er við sviðusoð, tá ið ræður um stovnspláss. Hinvegin hava teir ábyrgd av at fáa stovnin at virka fyrst og fremst.

- Tað sýnist sum nýggja mannagongdin fyrst og fremst røkir áhugamálini hjá foreldrunum heldur enn børnunum, sigur Elsa Hansen.

- Út frá námsfrøðiligum sjónarmiði virkar ein stovnur best, um spjaðing er í aldursbýtinum, bæði í vøggustovuni og barnagarðinum. Harumframt er normeringin av starvsfólkum eisini tengd at aldursbýtinum, tí ávísir aldursbólkar krevja ymiskt. Nýggja gongdin hevur eisini avleiðingar fyri normeringina og arbeiðið hjá einstaka starvsfólkinum, sigur Óli Midjord.

Í dag ert tú sera heppin, um barn títt fær eitt stovnspláss í økinum, har tit búgva. Tað er ikki so sjáldsamt, at foreldur hava børn á ymsum stovnum, sum allir liggja væl spjaddir. Eingin letur eitt pláss fara, tá ið tað vísir seg, hóast hetta førir við sær nógva koyring. Men í býlingshúsinum á Flat í Hoyvík hava tey fyri fyrstu ferð upplivað, at foreldur hava latið pláss frá sær, tí tey heldur vilja bíða eftir einum plássi á stovni í nærumhvørvinum.

- Tvey av seks hava sagt, at tey heldur vilja bíða eftir einum plássi nærri heiminum, og tað er nakað nýtt, sigur Elsa Hansen.

## Annað ber ikki til

Býráðspolitikarar og umsitingin í býráðnum eru kunnað um fyrstu ábendingarnar um avleiðingar av broyttu mannagongdini.

- Vit vóna, at tey hava lurtað eftir okkum og tikið til eftirtektar, at gongdin er óheppin fyri trivnaðin á dagstovnunum, sigur Óli Midjord.

Formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs, Heðin Mortensen, metir ikki, at avleiðingarnar, sum stovnsleiðararnir vísa á, viga so tungt, at mannagongdin skal broytast aftur. Eftir summarfrítíðina verður nýggja reglugerðin eftir øllum at døma samtykt.

- So leingi so stórur tørvur er á stovnsplássum, eru vit noydd at góðtaka støðuna. Tá ið tørvurin er nøktaður, ber til at tosa um økislistar og aðrar mátar at taka børnini inn á stovn. Eg skilji væl stovnsleiðararnar, men hinvegin kunnu teir taka hetta sum eina eyka avbjóðing. Vit eru eisini noydd til at lurta eftir borgarunum, sigur Heðin Mortensen, sum alla tíðina hevur verið heitur talsmaður fyri, at fyrsta barnið á bíðilistanum sleppur inn fyrst.

Tórfinn Smith, limur í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs, heldur hinvegin, at ein millumloysn hevði verið frægari.

- Fyrsta barnið á listanum eigur í størstan mun at sleppa fyrst inn, men vit eiga samstundis at miða eftir at taka atlit til aldursbýtið, soleiðis at vit koma so nær tí námsfrøðiliga rætta sum til ber. Eg skilji væl foreldur, sum argast um, at børn ið standa aftari á listanum sleppa framum. Men vit eru noydd at taka fyrilit soleiðis at dagstovnarnir kunnu virka sum námsfrøðiligir stovnar og uppalingarstøð heldur enn goymslur rætt og slætt. Treytin fyri góðum trivnaði á stovnunum er eitt nú ein góð spjaðing í aldursbýtinum, sigur Tórfinn Smith.

Nýggju upptøkureglurnar stytta sum kunnugt ikki um bíðilistan. Hann var 402 børn 28. mars. Í øðrum londum snýr kjakið seg um dygd og góðsku og hvørji tilboð børn skulu hava á dagstovnunum. Í Føroyum tosa vit framvegis um tøl, aldur og kyn.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



Tingið verður sett sunnudag:

# Tingmaður noktar at møta

*Finnbogi Ísakson, tingformaður, hevur sent tingfólkum skriv, har hann boðar frá, at løgtingið verður sett ólavsøkudag, sunnudagin 29. juli. Hetta er fyrstu ferð, at tingfundur verður settur sunnudag*



LØGTINGSFORMAÐURIN

9. juli 2001
J. nr. 1-20010003/ fl/nd
(at tilskila í svari)

Til løgtingsmenn, løgmann,
landsstýrismenn og ríkisumboðsmannin

Løgtingið verður sett ólavsøkudag, sunnudagin 29. juli kl. 13 í Útvarpshøllini. Skrúðgongan verður tó sum undanfarin ár úr túninum niðan fyri Tinghúsið oman í kirkjuna og niðanaftur í túnið.

Skrúðgongan verður sum undanfarin ár skipað í trimum røðum.
Fremstir ganga
- løgtingsformaðurin í miðjuni
- høgrumegin hann gongur løgmaður og
- vinstrumegin gongur biskupur.

Finnbogi Ísakson
Løgtingsformaður

**Hendrik Old, tingmaður, ætlar sær hvørki at møta til tingfundin ella skrúðgonguna á ólavsøku. Orsøkin er, at tingformaðurin fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð ætlar at seta tingið ein sunnudag**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

– Eg ætli mær ikki at møta til tingfund sunnudag. Tí gongur løgtingið ikki undan at virða halgidagslógina, er ikki neyðugt hjá øðrum at gera tað.

Hetta sigur Hendrik Old, tingmaður, í sambandi við, at løgtingsformaðurin hevur sent tingfólkum skriv, har hann boðar frá, at løgtingið verður sett ólavsøkudag, sunnudagin 29. juli, klokkan 13.

Tað er siðvenja, at løgtingið verður sett ólavsøkudag. Men vanligt hevur verið, at útseta setanina til mánadag og í staðin bert ganga skrúðgongu og fara í kirkju ólavsøkudag, um ólavsøkudagur fellur á ein sunnudag.

Heldur ikki hevur áður verið loyvt at seta tingið ein sunnudag. Men nýggja stýrisskipanin gevur heimild til at seta tingfund sunnudag, um hetta er á ólavsøku.

## Brýtur halgidagslógina

Hendrik Old heldur, at løgtingsformaðurin í hesum føri eigur at viga tingskipan og stýrisskipanarlóg upp í móti halgidagslógini.

– Hóast tað í nýggju stýrisskipanini er heimilað tingformanninum at seta tingið sunnudag á ólavsøku, eigur tingformaðurin at virða halgidagslógina, sum er púra greið.

– Tingformaðurin eigur at hava í huga, at sjálvt um tað í nýggju stýrisskipanini stendur, at tingfundurin kann haldast sunnudag, so er tó ikki neyðugt at halda hann. At tingfundurin kann haldast sunnudag merkir ikki, at hann skal haldast sunnudag, sigur Hendrik Old.

Hendrik Old vísir á, at tað hevur verið gamal siður, ikki at halda politiskan fund sunnudag. Tí heldur hann tað vera skeivt at løgtinginum at bróta hesa gomlu siðvenju og halda sín fyrsta politiska arbeiðsdag ein sunnudag.

– Ólavsøkurøða løgmans er sanniliga ein politisk røða. Og tingfundurin á ólavsøku er fyrsti arbeiðsdagurin hjá tinginum í nýggju setuni. Tí brýtur løgtingið halgidagslógina við at fara til arbeiðis ólavsøkudagin í ár, sum fellur á ein sunnudag.

– Fyri at vísa á hesa prinsipiellu støðu mína, ætli eg hvørki at møta til tingfundin ella ólavsøkuskrúðgonguna í ár, sigur Hendrik Old.



*Hendrik Old úr Javnaðarflokkinum verður hvørki at síggja í ólavsøkuskrúðgonguni ella á ólavsøkutingfundinum í ár. Orsøkin er, at hann mótmælir, at tingformaðurin hevur gjørt av at seta tingið ein sunnudag*

# Biður formannin flyta fundin

**Jenis av Rana úr Miðflokkinum fer at heita á tingformannin um at bíða við at seta tingið til mánadagin eftir ólavsøku**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

– Eg haldi tað ikki vera neyðugt at seta tingið ein sunnudag. Tí fari eg at heita á tingformannin um at lata vera, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana úr Miðflokkinum er samdur við grundgevingunum hjá Hendriki Old. Men hann hevur kortini ikki gjørt av at boykotta tingfundin og skrúðgonguna.

Jenis av Rana sigur seg rokna við, at tingformaðurin fer at flyta tingfundin til mánadagin eftir ólavsøku. Men um formaðurin ikki ger tað, fer hann at umhugsa, um hann skal møta til fundin sunnudagin.

– Sum sagt eri eg samdur við grundgevingunum móti at seta tingið sunnudag. Men eg haldi tað vera løgi, at tingmenn brádliga eru í øðini um hetta. Tí tá eg áður havi boðað frá, at eg haldi tað vera skeivt, at samgonga og andstøða spæla fótbólt móti hvørjum øðrum sunnudag og tí ikki vil møta, hava tingmenn verið í øðini um tað. So eg má bara staðfesta, at tað finnast nógvir hyklarar, sigur Jenis av Rana.

# Fólkaflokkurin viðger málið

**Fólkaflokkurin viðgjørdi á fundi í gjár, um tingmanningin í felag skal mótmæla, at tingið fer til arbeiðis Sunnudagur**

TINGFUNDUR
*John Johannessen*

Eisini í flokkinum hjá løgmanni, Fólkaflokkinum, halda tingfólk tað vera skeivt at seta tingið sunnudag. Jógvan við Keldu við Keldu er ein teirra.

– Føroyingar hava higartil hildið seg relativt væl til halgidagslógina. Og tí haldi eg, at tingformaðurin ikki skal halda fast uppá at seta tingið ólavsøkudag, tá hetta er sunnudagur. Fyrsti tingfundurin og ólavsøkurøðan eru nevniliga ógvuliga politisk, heldur Jógvan við Keldu.

Jógvan við Keldu boðaði flokki sínum frá støðu síni á fundi í gjár, og sum Sosialurin skilir, ætlar flokkurin at melda út í felag, at hann heldur tað vera skeivt at seta tingið sunnudag.

Sambandsflokkurin fer eisini at viðgera málið. Sosialurin hevur tosað við Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum, og hann sær onga meinging í at seta tingið sunnudagin 29. juli.

Heini O. Heinsen úr Tjóðveldisflokkinum heldur, at tað kann skapa trupulleikar, um fundurin verður settur mánadagin eftir ólavsøku. Tí so er vandi fyri, at tingfólk ikki møta til skrúgonguna.

Helena Dam á Neystabø úr Sjálvstýrisflokkinum sær onga forðing fyri, at tingið verður sett sunnudag.

– Vit eru sum so ikki til arbeiðis ólavsøkudag. Tí vit viðgera ikki røðuna fyrr enn fleiri dagar seinni, sigur hon.